## Vilja hava sálarfrøðing

Foreldur í grønlendsku bygdini Qaanaaq eru vónsvikin av frágreiðingini, sum Karen Littauer hevur skrivað um viðurskiftini í bygdini. Tey siga, at á einum skeiði fekk Karen Littauer børini at siga sær, hvussu nógv foreldrini drukku, og hvussu tey høvdu tað, og børnini sluppu ikki at tosa við foreldrini. Foreldrini siga, at hetta hevur lagt stórt sálarligt trýst á børnini, og nú vilja tey hava ein sálarfrøðing til bygdina at hjálpa børnunum.

## Millumlendi við sjúklingi

Altjóða flogvøllurin í Keflavík í Íslandi fekk seinnapartin í gjár vitjan av einum stórum gesti, tá eitt flogfar av slagnum Boeing 777-300 hjá franska flogfelagnum Air France setti seg har. Flogskiparin bað um loyvi at millumlenda í Keflavík, tí eitt av ferðafólkunum var vorðið sjúkt. Flogfarið fekk sjálvandi lendingarloyvi, og ferðafólkið slapp á sjúkrahús í Reykjavík. Boeing 777-300 vigar 300 tons og tekur millum 300 og 400 fólk.

Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur:

# Málið illa umhugsað

**Tað var naivt at hugsa, at Heðin Mortensen skuldi latið sín persónliga tingsess frá sær til ein av argastu politisku fíggindunum, heldur Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

-Kaotiskt!

Soleiðis skýrir Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur, málið um setanina av nýggja landsstýrismanninum hjá Sambandsflokkinum.

- Málið tykist ógvuliga illa umhugsað. Tað var naivt av Sambandsflokkinum at halda, at Heðin Mortensen skuldi latið sín tingsess til ein av argastu politisku fíggindum sínum, Høgna Mikkelsen, sigur Sjúrður Skaale.

Hann heldur samstundis, at tað er beinleiðis tragiskt, at eitt persópnsmál nú skuggar yvir eitt so álvarsligt mál sum lógina um vinnuligan fiskiskap, ið liggur í tinginum í løtuni.

- Tað má sigast at vera harmiligt, at stríð og agg millum persónar skal fáa alla umrøðuna, meðan eitt so álvarsligt mál sum lógin um vinnuligan fiskiskap púra verður sett í aðru røð. Tað átti at fingið umrøðu heldur enn Heðin, Jóannes, Kaj Leo ella Høgni, sigur Sjúrður Skaale.

Hetta er sama skilið sum undir síðstu samgongu, tá persónsmál eisini kávaðu út yvir politiska innihaldið, heldur Sjúrður Skaale.

### Bara menn

Talan er bara um glantrileik við ongum innihaldi, og tað verður ikki betri av, at fjølmiðlarnir glaðbeintir bera brenni á bálið.

- Politikarar eins væl og fjølmiðlarnir áttu at víst størri ábyrgd. Teir áttu at hugsa seg betri um, tí tað, sum fer fram nú, er ikki til gagns fyri nakran, sigur Sjúrður Skaale.

Hann heldur eisini, at tað lekur álvarsliga millum teori og praksis hjá Sambandsflokkinum, tí teir tosa um javnstøðu, men tá til stykkis kemur, er bara talan um mannfólk.

- Teir hava havt eini tíggju evnir til landsstýrisfólk, og ikki eitt tað einasta konufólk er ímillum. Tað samsvarar illa við tað, sum teir siga seg vilja, vísir Sjúrður Skaale á.

Hann viðgongur tó, at fjølmiðlarnir eiga sín rætt til at útnytta slík persónsmál, tí tað er nakað, ið øll kunnu fyrihalda seg til, og tí eisini nakað, ið selur fleiri bløð. Men tað stutta av tí langa er kortini, at Sambandsflokkurin átti at kanna sítt bakland betri, áðrenn meldað var út um nýggjan fíggjarmálaráðharra, metir samfelagsfrøðingurin.



*Kaotiskt, heldur Sjúrður Skaale um støðuna hjá Sambandsflokkinum í sambandi við setan av nýggjum landsstýrismanni.*

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfkoksins:

# Avtalan var púra greið

**At løgmaður nú roynir at skjóta seg inn undir stýrisskipanarlógina broytir ikki tann veruleika, at avtalan okkara millum var púra greið: Heðin skuldi ikki gerast nøkur forðing**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Formaður Sambandsflokksins er ikki í iva. Hann, sum formaður í einum politiskum flokki, hevði eina avtalu við Jóannes Eidesgaard, sum formann í øðrum politiskum flokki.

Avtalan var sambært Kaj Leo púra greið: Kom tað hartil, at antin hann ella Lisbeth Petersen fóru úr tinginum av einihvørjari orsøk, so skuldi Heðin Mortensen ikki gerast nøkur forðing fyri, at næsti maður (eftir Heðin) kom á ting.

Tað, at blanda stýrisskipanarlóg og annað fyrifallandi upp í hesa avtalu, heldur Kaj Leo Johannesen lítið um.

Tá eg geri eina avtalu við í hesum føri Jóannes Eidesgaard, so rokni eg við, at hann hevur sítt bakland í ordan, og at hann kann halda ta avtalu, sum hann ger, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann dylir heldur ikki fyri, at hann er vónbrotin av mátanum, sum Sosialurin hevur handfarið málið, tí hann metir ikki, at tað, ið er ført fram í blaðnum, er í tráð við veruleikan.

-Eg kenni meg illa av at fáa so nógvar lortaspannir oman yvir meg. Men eg havi valt at líta frameftir og lata farið vera farið, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Trúvirði løgmans

Kaj Leo Johannesen er ógvuliga vónbrotin av tí, sum hann nevnir at renna undan ábyrgd. Tí tað er tað, sum løgmaður í hansara verð ger.

Eitt orð er eitt orð, og ein avtala er ein avtala. Men sjálvt um avtalan í hesum føri ikki er innfríað av løgmanni, so fari eg kortini framyvir at trúgva einum orði frá einum floksformanni, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vísir á, at tá hann gjørdi hesa avtaluna, so roknaði hann við, at Jóannes Eidesgaard hevði tryggjað sær, at hann kundi halda tað, sum hann lovaði.

Formaður Sambandsfloksins metir tí, at tað er løgmaður heldur enn hann sjálvur, sum hevur ein trupulleika við trúvirðinum.

Kaj Leo Johannesen leggur tó dent á, at hetta málið nú er farið afturum, og at hann nú vil líta frameftir heldur enn at vevja í tí sama. Og sum nevnt hevur hann ikki mist trúnna upp á at eitt orð er eitt orð, og ein avtala er nakað, ein kann rokna við og líta á.



*Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, vil lata farið vera farið, og heldur líta frameftir.*